# Stórfingin kirkjukonsert

**100 ára haldið í Vági hevur verið alla farnu viku og fríggjadagin var stórfingin kirkjukonsert í Vágs Kirkju**



TÓNLEIKUR
*Planet.fo*

Vágs Kommuna er 100 ár og tiltøk hava verið í hópatali alla vikuna. Leygardagin byrjaði tað við almennum morgunmatarborði við alskyns undirhaldi og á kvøldi var kvøldseta og dansur.

Fríggjadagin vóru mong tiltøk, m.a. spurnarkapping og sangløtur og ein stór kirkjukonsert í Vágs Kirkju. Eini 500-600 fólk høvdu leitað sær í Vágs Kirkju til konsertina, sum kirkjuráðið tók stig til og sum Tórður Poulsen samskipaði.

Hjalmar Magnussen, Magni Christiansen, Lisa Frederiksberg og Heini Lützen leiktu í nevndu raðfylgju. Heini og Magni sum einstaklingar, meðan Hjalmar og Lisa høvdu tónleikarar afturat sær.

Hjalmar var lokala innleggið á konsertini, og legði fyri, og við sær hevði hann Trónd Enni og Dagfinn Olsen. Teir spældu bæði kent tilfar, so sum Vovið av Guði, og nýtt upprunatilfar hjá Dagfinni.

Hjalmar, ið er kendur sangari í Suðuroynni, men sum kring landið helst er kendast sum maðurin, i syngur Vovið av Guði á fløguni Vælskapt Brek, kom sera væl frá sangframførsluni.

Framførslan hjá hesi trio var sermerkt við, at manningin í teimum 5 løgunum leikti fleiri ymisk ljóðføri, so sum gomlu urguna í kirkjuni, klaver, guitar, bass, mandolin, harmoniku, horn og ukulele.

Magni Christiansen trein síðani fram vi guitari, hatti og undirløgdum tónleiki og hann gjørdi beinanvegin greitt, at hann vildi hava fjøldina við og hann dugdi eisini væl at framføra og at fáa fjøldina við sær.

Talan var um rættan countrytónleik og Magni sang væl og á skránni vóru sangir, ið eru kendir frá fløgum hansara. Terji Vestergaard sang við Magna.

Lisa Frederiksberg kom síðani fram gólvið saman vi tónleikarum og hon sang sera væl, og saman við tónleikarum sínum hevði Lisa eina góða og inniliga konsert.

Lisa dugdi eisini væl at samskifta við áhoyrararnar.

Heini Lutzen skuldi seta punktum og tað gjørdi hann við góðari rødd og góðum guitarspæli. Hann hevði eina góða og trygga framførslu, har m.a. frálíku útsetingarnar av sálmum hugtóku.

Heini prógvaði sína góðu rødd og sítt frálíka guitarspil og setti eitt virðiligt punktum, innan Patrick de Neergaard, prestur, takkaði fyri og fjøldin sang "Nú dagurin at enda er", meðan høvuðsnøvnini á konsertini sungu fyri, og ein stórfingin løta í Vágs Kirkju var at enda komin.

# Áin vakra, Stórá við Norðskála

HUGLEIÐING
*Elsa Annika Olsen*

Góðveðursdagar tá hon rennur líðandi og møk. Tað bláa loftið og sólargeiðslarnir spegla og spæla sær í henni.

Regndagar, tá hon skúmandi og vill fer brúsandi út í sundið, og ein ikki møðist av at líta á og aftur og aftur undrast á ta ótrúligu náttúrumegi, sum í henni er goymd.
Óveðursdagar, tá ið vindurin blæsir Antarfoss beint upp í loft, og tað tykist sum tjúkkur roykur úr skorsteininum, og vit siga: "Nú kókar kellingin døgurða". Àin, sum frá upphavi sínum hevur runnið og runnið, og aftur og aftur hevur verið havd á munni. "Hygg áin, hvussu vøkur hon er í dag", ella " Ì dag er hon soltin" ella "Hygg hvussu stór hon er ì dag , nú er hon vandamikil og børnini mugu ikki fara henni ov nær" … Hvussu mangan hava vit ikki undrast og aftur undrast á vakurleikan, friðin og villuna, sum hon hevur við sær. Og um vit ikki hava sagt nakað, so hava vit hugsað…. Jú av sonnum ein dýrabar PERLA, sum frøðir eygað, rørir sálina, og fær ein at gleðast um Guðs stóra skapanarverk. Ikki møðist hon, hvønn dag syngur hon song sín, hin sama, sum hevur ljóða øld eftir øld…. Men lurtið! Nú syngur hon deyðsong sín. Skjótt fer songur hennara at tagna. Skjótt fara vit bert at síggja leivdirnar av henni og onkran hissini slíggjutan hyl, við stinkandi rotnum vatni. Skjótt fara dust og mold at leggjast ímillum stóru klettarnar og smáu steinarnar í henni, og skjótt fer grasið at grógva, har hon áður so stolt og vøkur rann. Skjótt fer hon, tann seinasta av øllum, at verða eins og allar hinar her um leiðir, uppturkað og ljót.

SEV hevur fingið loyvið til at taka hana og gera tað sama við hana, sum við allar hinar, nevniliga at leiða hana undir heilt, so at hon eina ferð fyri allar hvørvur, og vit ongantíð aftur skulu undrast á vakurleikan og megina í henni, og hon ongantíð aftur skal røra kenslur okkara. Kenslur, sum ikki kunnu keypast fyri pengar, og sum ongantíð kunnu virðismetast í gulli og skreyti. Kenslur, sum gera okkum til menniskju, og sum vit ongantíð fara at fáa, við at tendra eina kontakt, um so peran íð tendrað verður, er fleiri túsund watt.

Sigast skal, at eg við heilum huga gangi inn fyri reinum umhvørvi, og at tað er gott at vit kunnu vinna orku úr náttúruni. Men at gera eitt so stórt inntriv, sum her er gjørt, er heilt burturvið. Fert tú ein túr í hagan, rennur tú teg allar staðir í uppturkaðar áir, sum skemma og mispríða náttúruna heilt ótrúliga nógv, og fáa landslagið at síggja fátakt og berligt út. Tú roynir at ímynda tær, hvussu tað nú hevði verið, um handan, ella handan áin rann har og har. Eg havi ikki sæð tær, av tí at eg ikki eri uppvaksin her. Men arrini síggjast, hvar tú enn vendir tær. Hugsi, at tað átti at bori til, um ikki annað at latið tær áir, sum renna ígjøgnum bygdinar fingið frið.

Dugi illa at skilja, at loyvið varð givið til at hendan áin skal fáa somu lagnu sum allar hinar, og dugi als ikki at skilja, at fólkið í kommununi, ikki mótmælir. Hóskandi hevði verið, um øll kommunan savnaðist um hana, áina vøkru, Stórá, sum øld eftir øld hevur ljóðað og sjóðað. Sum uttan iva hevur sløkt mangan tostan, svælt manga pannu og skola mangt plaggið. Stórá, sum sá undanfarnu ættarlið vaksa upp. Hana, sum um hon hevði mannamál, kundi sagt okkum so mangt um tað undanfarnað. Jú, vit áttu at savnast um hana, sum ótroyttulig nátt og dag, hevur sungið og sungið, og heiðurliga sagt henni farvæl og sungið deyðsongin saman við henni og syrgt hana. Tí syrgiligt er tað, at hon skal fara. Og víst er tað, at verður gjørt eftir ætlan, og verður Stórá, tann seinasta, sum eftir er her á leið tikin, so er óðamannaverkið fullkomið. Tá vendist ikki aftur. Tá kunnu vit so siga komandi ættarliðið frá, um áina vøkru sum einaferð rann. Vár og summardagar møk og vøkur, heystardagar, stór og brúsandi, og um tá ið hon á vetrardegi vill og óð bresti ísin av sær, tí at hon aftur vildi renna frí. Um børnini sum spældu í henni, um kellingina sum kyndið og um hvussu harmuligt og syrguligt vit halda tað verða, at hon ikki er meir.

Við Norðskála 8 okt.2007

